Álit

í

løgtingsmáli nr. 102/2023: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um dagstovnar og dagrøkt (Pengarnir fylgja barninum)

Árni Skaale, Bárður á Lakjuni, Beinir Johannesen, Elsebeth Mercedis Gunnleygsdóttur og Jørgen Niclasen, løgtingsfólk, hava vegna Fólkaflokkin lagt málið fram 7. mars 2024, og eftir 1. viðgerð 19. mars 2024 er tað beint Mentanarnevndini.

Nevndin hevur viðgjørt málið á fundi 21. mars og 3. og 10. apríl 2024.

Undir viðgerðini hevur nevndin havt fund við Javnstøðunevndina, Føroya Pedagogfelag, Vinnuhúsið, Kommunufelagið og landsstýrismannin í barna- og útbúgvingarmálum, Djóna Nolsøe Joensen, saman við Gigni.

Undir viðgerðini hevur nevndin býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Sólvit E. Nolsø, Jóhannis Joensen, Súsanna Bertholdsen, Liljan Weihe og Erling Eidesgaard) hevur hesar viðmerkingar:

Skipanin, sum vit brúka til at skipa barnsburðarfarloyvir í Føroyum, er barsilsskipanin, og hana ætlar samgongan eisini at brúka í arbeiðinum at bøta um viðurskiftini hjá barnafamiljum.

Í fleiri ár hava fleiri samgongur arbeitt uppá at bøta um barsilsskipanina. Millum annað við líðandi at leingja barsilstíðarskeiðið upp í eitt ár, og har er komið á mál.

Samgongan hevur sett sær fyri at halda fram við arbeiðinum at bøta um barsilsskipanina. Serliga átrokandi er tað blivið, nú barnatalið í Føroyum er lækkað nógv, og tørvurin á at bøta um umstøðurnar hjá barnafamiljum er blivin eyðsýndur.

Í tí sambandi er eitt uppskot lagt fyri tingið, har ætlanin er at hækka hægsta mánaðarliga útgjaldið úr kr. 25.000 upp í kr. 30.000 og at loyva teimum, sum hava fingið barn og nýliga hava lokið lesnað, inn í skipanina við at studningurin, sum tey hava fingið seinasta árið, kann telja við í útrokningargrundarlagnum av barsilsútgjaldinum (lm. 92/2023). Tað hevur ikki fyrr verið møguligt.

Tað eru fleiri aðrar ábøtur í umbúna. Millum annað hendan, ið stendur í samgonguskjalinum:

”*Barsilsskipanin verður broytt til eina smidligari skipan, har til ber hjá foreldrum at leggja barsilsstíðina til rættis eftir egnum ynski og tørvi.*”.

Við hesum viðmerkingum tekur meirilutin ikki undir við málinum og mælir Løgtinginum frá at samtykkja uppskotið.

Minnilutin (Magnus Rasmussen og Bárður á Lakjuni) hevur hesar viðmerkingar:

Uppskotið snýr seg um at geva kommununum eina heimild – eitt amboð – til betur at kunna skipa barnaansingarøkið, sum, um heimildin verður nýtt, fer at geva foreldrum ein nýggjan valmøguleika, tá tað snýr seg um fyrstu árini hjá barninum.

Tørvur er á, at foreldur kunnu fáa størri frælsi at skipa sín gerandisdag, og hetta uppskotið er ein liður í hesum at geva foreldrum størri frælsi og smidleika at leggja til rættis, hvussu barnaansing teirra skal skipast. Uppskotið ásetur eina heimild til kommunurnar at rinda part av kostnaðinum fyri stovnspláss til foreldur, um tey velja at ansa egnum børnum heima. Hetta verður gjørt út frá meginregluni um, at pengarnir skulu fylgja barninum. Talan er um skattafría veiting, sum í mesta lagi kann vera 70% av ansingarkostnaðinum í einstøku kommununi, og eftirløn skal eftir ætlan rindast av veitingini.

Líknandi skipanir eru galdandi í nøkrum av grannalondum okkara.

Hóast partarnir, ið eru hoyrdir í málinum, hava verið ymiskir á máli um, nær barnið kensluliga er til reiðar at fara heimanífrá og verða skilt frá sínum primeru umsorganarpersónum – foreldrunum – so hevur verið áhugavert at hoyra, at flest allir viðkomandi hoyringarpartar innan økið eru samdir um, at sum nú er, fer hetta fram ov tíðliga. Tað er ov tíðliga at lata eitt barn á stovn, tá tað bert er 10-12 mánaðir gamalt. Hetta samsvarar eisini væl við tað, sum eitt nú høgt virdir, danskir granskarar hava ført fram.

Berlingske.dk skrivar soleiðis í grein frá 2019:

"Samtidig stiller flere af landets førende børneforskere og sagkyndige gennem de seneste 30 år nu også grundlæggende spørgsmål ved et af de allermest fundamentale aspekter ved vores velfærdssamfund. Som tidligere formand for Børns Vilkår cand.pæd. og psykolog John Halse formulerer det:

- *Adskillelsen mellem en far eller mor og et barn er et af livets første store dramaer, og det drama udspiller sig i de danske daginstitutioner, fordi det måske er fundamentalt unaturligt at overlade sit barn til fremmede individer så tidligt, som vi gør."*[1]

Norðurlond – har ímillum eisini Føroyar – teljast millum tey lond, har børnini fara heilt ung á barnaansingarstovn. Hjá allarflestu okkara er støðan tann, at vit eru noydd at loypa innaftur í sonevnda "hamstarahjólið", tí serliga fíggjarligu umstøðurnar loyva okkum ikki at verða heima í longri tíðarskeið, enn barsilsfarloyvið loyvir. Júst her hevði eitt uppskot sum hetta verið ein góð hjálp. Tí spurningurin eigur altíð at vera, hvat ið er best fyri barnið og fyri familjuna sum heild.

Høvuðsendamálið við uppskotinum er, sum nevnt, at geva foreldrunum møguleika til í størri mun at vera saman við sínum barni fyrstu árini, og tað eru fleiri fyrimunir við hesum. Eitt nú fer tað at gerast fíggjarliga betur møguligt hjá foreldrum at vera um sítt barn eitt sindur longur enn bert í

[1] Berlingske 08.04.2019 undir yvirskriftini: "*Førende børneforskere: Det reelle omsorgssvigt er, at vores børn er for små, når vi overlader dem til fremmede*"

barsilsfarloyvistíðarskeiðnum. Foreldur fáa meiri tíð saman við barni sínum. Barnið fær tættari tilknýti til primeru umsorganarpersónar sínar – foreldrini. Hetta er ein so ómetaliga týdningarmikil førningur víðari í lívinum – hjá barninum fyrst og fremst, men sanniliga eisini hjá foreldrunum.

Aðrir fyrimunir eru eisini; eitt nú kann ein slík skipan vera sjúkufyribyrgjandi hjá barninum, tí flest øll børn eru ofta sjúk ta fyrstu tíðina á stovni. Ein slík skipan kann eisini taka eitt ávíst trýst av barnaansingarskipanini, nú tað í fleiri kommunum er trot á bæði námsfrøðingum og stovnsplássum. Haraftrat er vert at hava í huga, at tá støðan á barnaansingarøkinum er so strongd, sum hon tykiskt vera í støðum í løtuni, ja, so er støðan avgjørt ikki nøktandi hjá hvørki barni ella foreldrum. Professor emeritus og fyrrverandi formaður fyri Børnerådet í Danmark, Per Schultz Jørgensen (1933-2022), er siteraður soleiðis í áðurnevndu grein:

"Når vi har børn helt ned i timånedersalderen i institution, bliver vi nødt til at være meget opmærksomme på omsorg og nærhed, for sænker vi kvaliteten for meget, kan det få konsekvenser langt op i livet."

Undir hoyringunum hevur verið ført fram, at ein vansi við einum uppskoti sum hesum kundi verið, at børn, ið hava serligan tørv, og børn, sum eru í vanda fyri at detta niðurímillum í skipanini, ikki nóg tíðliga og skjótt verða loftað. Hetta eru góðar og neyðugar grundgevingar, tí umráðandi er, at slík børn og slíkar familjur fáa ta hjálp, teimum tørvar, so skjótt, sum møguligt.

Stovnurin, Gigni, tekur sær longu av at vitja heimini frá tí, at barnið verður føtt og til tað er 18 mánaðir. Eru viðurskifti í familjuni, sum Gigni metir ikki eru nøktandi, so heldur Gigni fram so leingi, sum stovnurin metir tørv vera á at vitja og ráðgeva familjuni. Tíðarskeiðið á 18 mánaðir kundi verið longt til 3 ár fyri øll, soleiðis at allar familjur fáa eitt ávíst tal av vitjanum, áðrenn børnini verða útskrivað.

Í øllum førum átti ein skipan, ið kann gagna teimum allarflestu, ikki at verið vrakað, hóast vandi er fyri, at onkur fellur niðurímillum.

Havast skal í huga, at tað finnast eisini tey, sum koma illa fyri í teimum skipanum, ið longu eru galdandi. Og tað kann væl hugsast, at júst ein slík skipan, sum her er í uppskoti, hevði givið meiri rúmd fyri teimum í skipanini, ið hava serligan tørv.

Samanumtikið kann sigast, at um kommunurnar fáa heimildina, so kann hetta føra til, at foreldur fáa ein møguleika fyri meiri smidleika í gerandisdegnum. Einum smidleika, sum kann virka fyri at fyribyrgja strongd og "hamstarahjóls-tilveru" hjá smábarnafamiljum.

Við hesum viðmerkingum tekur minnilutin undir við málinum og mælir Løgtinginum til at samtykkja uppskotið.

Mentanarnevndin, 7. mai 2024

Sólvit E. Nolsø formaður	Jóhannis Joensen næstformaður	Súsanna Bertholdsen
Liljan Weihe	Erling Eidesgaard	Magnus Rasmussen
	Bárður á Lakjuni	